# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 15. januar 2019 |
| Mál nr.: | 19/00023 |
| Málsviðgjørt: | |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll**

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll

(Ymiskar dagføringar, fráboðanarskylda, fylgibroytingar og annað í tolllógini)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 30. apríl 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 5 verður strikað.

**2.** Í § 6, litra g, verður "(tó undantikið tannprotesur)" strikað.

**3.** Í § 23 verður sum stk. 3 sett:
"Landsstýrismaðurin kann somuleiðis áseta nærri reglur um tænastugjøld í sambandi við tolleftirlit og í sambandi við elektroniskar fráboðanir og avgreiðslur."

**4.** Í § 27 a verður sum stk. 4 sett:
"Tollvaldið boðar rætta og avvarðandi myndugleika frá, tá ið djór, plantur, heilivágur, gjaldoyra v.m. eru steðgað í tolleftirlitinum í sambandi við innflutning av vørum til føroyska tolløkið, útflutning ella transit av føroyska tolløkinum sambært stk. 1. Avvarðandi myndugleiki hevur ábyrgdina av at málsviðgera tílík mál liðugt."

**5.** Í § 28, stk. 3 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Tollvaldið kann krevja at fáa upplýsingarnar talgilt, eitt nú við beinleiðis atgongd til skipanir hjá flutningsførum og/ella flutningsfeløgum, uttan kostnað fyri tollvaldið."

**6.** Í § 28, stk. 6 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Tollvaldið ásetir, hvat neyðug útgerð er til hølir at gera ferðafólkaeftirlit í. Tollvaldið kann hava vakmyndatól á flogvøllum og farstøðum (ella har

ferðafólk koma í land) til tolleftirlit. Tollvaldið kann goyma vakmyndaupptøkur í 30 dagar ella eftir tørvi.”

**7.** Í § 28 verður sum stk. 8 sett: “Havnamyndugleikar og flogferðslumyndugleikar hava skyldu til at siga tollvaldinum frá ávikavist ófráboðaðum skipum og ófráboðaðum flogførum, sum koma til tolløkið. Havnamyndugleikar hava skyldu til at siga tollvaldinum frá, vera teir varugir við, at skip uppskipa ella innskipa vørur ólógliga.”

**8.** Í § 28 verður sum stk. 9 sett: “Útlendsk skip, sum koma inn á tolløkið, skulu hava føroyskan agent.”

**9.** Í § 30, stk. 3 verður “og bert eftir boðum frá ovasta hjáverandi tollyvirmanni” strikað.

**10.** § 36, stk. 1, nr. 2 verður orðað soleiðis: “Ikki fylgir einum smb. § 27, 2. stk. ella § 28, 3., 5., 6. ella 8. stk. ásettum boði.”

**11.** § 36, stk. 1, nr. 3 verður orðað soleiðis: “Brýtur ella roynir at bróta § 28, 2., 4., 6. og 9. stk. og § 29, 1.-3. og 5. stk.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 (vanliga nevnd tolllógin) varð seinast broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 30. apríl 2011. TAKS hevur gjørt Fíggjarmálaráðið varugt við, at tørvur er á at dagføra og broyta ávísar ásetingar í tolllógini. Talan er um ásetingar, sum ikki eru tíðarhóskandi og sum ikki samsvara við galdandi mannagongdir og umsitingina av tolllógini í dag. Talan er eisini um nakrar tøkniligar dagføringar av tolllógini.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er eins og greitt frá omanfyri tolllógin, sum seinast varð broytt í 2011. Tørvur er á at broyta og dagføra ávís viðurskifti í tolllógini, sum ikki longur eru tíðarhóskandi og sum ikki samsvara við umsitingina av tolllógini í dag.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at dagføra og broyta nøkur viðurskifti í tolllógini, sum ikki samsvara við galdandi mannagongdir, bygnaðin á TAKS og við umsitingina av tolllógini í dag.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Talan er tilsamans um 11 broytingar í tolllógini, sum eru lýstar niðanfyri:

1. **§ 5 í tolllógini strikað.** Sambært § 5 í galdandi tolllóg er toll- og vøruskráin til skjals og kann keypast frá Toll- og skattstovu Føroya, og landsstýrið ásetur gjaldið fyri toll- og vøruskránna.

   Fíggjarmálaráðið mælir til at strika § 5 í galdandi lóg. Í dag er toll- og vøruskráin sjálvsagt ikki bara til skjals, men liggur eisini alment atkomulig og ókeypis á heimasíðuni hjá TAKS. § 5 í galdandi tolllóg tekur ikki hædd fyri møguleikunum, sum eru komnir við internetinum og heimasíðum. Fíggjarmálaráðið skjýtur tí upp at strika § 5.

2. **Tannprotesur undantiknar tolli og javnsettar aðrar protesur.** Sambært § 6, litra g í galdandi tolllóg eru tannprotesur ikki undantiknar tolli. Allar aðrar protesur eru kortini undantiknar tolli.

   Fíggjarmálaráðið skjýtur upp, at tannprotesur verða undantiknar tolli, eins og aðrar protesur.

3. **Heimild í § 23 um at áseta tænastugjøld verður nágreinað.** Sambært § 23 í tolllógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um avgreiðslutíðina hjá Toll- og Skattstovu Føroya og um tænastugjøld fyri tollavgreiðslur, sum fara fram aftaná avgreiðslutíð. Landsstýrismaðurin kann eisini áseta nærri reglur um tænastugjøld í sambandi við tolling og umtolling.

Fíggjarmálaráðið skjýtur upp, at heimildin eisini fevnir um tænastugjøld í sambandi við tolleftirlit og at heimild verður at áseta gjøld í sambandi við elektroniskar fráboðanir og avgreiðslur.

4. **Málsviðgerð av lutum, sum eru steðgaðir í eftirlitinum.** Sambært § 27 a hevur Tollvaldið eftirlit við, at tað ikki í sambandi við innflutning av vørum til føroyska tolløkið, útflutning ella transit av føroyska tolløkinum verða framd brot á forboð móti innflutningi, útflutningi ella transit, sum eru ásett av trygdar-, heilsu-, djóralæknafrøðiligum-, plantupatologiskum-, gjaldoyra- ella øðrum orsøkum.

   Í galdandi tolllóg er ikki greitt, hvør stovnur ella myndugleiki hevur ábyrgdina av at málsviðgera tey mál og lutir liðugt, sum eru steðgað í tolleftirlitinum. Innflutningurin er nógv vaksin síðstu árini, og hetta hevur við sær nógva umsiting av tílíkum málum fyri TAKS.

   Fíggjarmálaráðið skjýtur upp, at gjørt verður greitt í tolllógini, at TAKS boðar rætta og avvarðandi myndugleika/stovni frá, tá ið djór, plantur, heilivágur, gjaldoyra v.m. eru steðgað í eftirlitinum í sambandi við innflutning og at avvarðandi myndugleiki/stovnur hevur ábyrgdina av at málsviðgera tílík mál liðugt.

5. **Upplýsingar um ferðafólk og atgongd til ferðafólkaskipanir.** Flutningsfeløgini í Føroyum, t.e. Atlantic Airways og Smyril Line, hava eftir áheitan givið TAKS allar upplýsingar um ferðafólk.

   Hóast TAKS og Fíggjarmálaráðið meta, at neyðug heimild er í tolllógini og í kunngerð nr. 38 frá 2012 um tolleftirlit, skjýtur Fíggjarmálaráðið upp at nágreina heimildirnar soleiðis, at ivi ikki er um, at tollvaldið skal hava atgongd til ferðafólkaupplýsingar talgilt og uttan kostnað.

6. **Neyðug útgerð í hølum til tolleftirlit og vakmyndatól.** Fíggjarmálaráðið mælir til, at tað verður gjørt greitt í § 28, stk. 6 í tolllógini, at tollvaldið ásetir, hvat neyðug útgerð er til hølir at gera ferðafólkaeftirlit í, at tollvaldið kann hava vakmyndatól á flogvøllum og farstøðum til tolleftirlit og at tollvaldið kann goyma vakmyndaupptøkur í 30 dagar ella eftir tørvi.

7. **Fráboðanarskylda til havna- og flogferðslumyndugleikar.** Fyri at lætta um uppgávuna hjá TAKS at hava tolleftirlit skjýtur Fíggjarmálaráðið upp, at tað verður álagt havnamyndugleikum og flogferðslumyndugleikum at boða tollvaldinum frá, tá ið ófráboðað skip og flogfør koma til tolløkið, og tá ið havnamyndugleikar vera varugir við, at skip uppskipa ella innskipa vørur ólógliga.

8. **Útlendsk skip skyldu at hava føroyskan agent.** TAKS og Fíggjarmálaráðið meta, at tørvur er á einum kravi um, at útlendsk skip, sum koma inn á føroyska tolløkið, hava føroyskan agent.

9. **TAKS er í dag skipað við tollleiðara og tollarum.** Í § 30, stk. 3 í tolllógini er ein orðing um, at tollyvirmaðurin skal geva boð um útvíðkaða kanning av fólki. Orðingin stavar frá fyrr av, tá ið tollyvirmenn starvaðust hjá tollvaldinum. TAKS er í dag skipað við einum tollleiðara og so tollarum. Teir tollarar, sum eru á vakt, taka støðu í samráði

við hvønn annan. Í dag er ikki talan um, at ein tollari er omanfyri annan tollara, og TAKS hevur ikki tollyvirmenn í starvi í dag.

10. **Fylgibroyting í revsireglum.** Revsireglurnar í § 36, stk. 1, nr. 2 nevna sjálvandi ikki nýggja stk. 8 í § 28, sum skotið verður upp at skjóta uppí tolllógina. Fíggjarmálaráðið skjýtur upp at gera fylgibroyting í revsireglunum í § 36, stk. 1, nr. 2, soleiðis at nýggja stk. 8 í § 28 eisini verður nevnt.

11. **Fylgibroyting í revsireglum.** Revsireglurnar í § 36, stk. 1, nr. 3 nevna sjálvandi ikki nýggja stk. 9 í § 28, sum skotið verður upp at skjóta uppí tolllógina. Fíggjarmálaráðið skjýtur upp at gera fylgibroyting í revsireglunum í § 36, stk. 1, nr. 3, soleiðis at nýggja stk. 9 í § 28 eisini verður nevnt.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ligið til almenna hoyring á Hoyringsportalinum hjá landsstýrinum.

Harafturat varð uppskotið sent til ummælis hjá:

- Vinnuhúsinum
- Atlantic Airways
- Smyril-Line
- TAKS
- Kommunufelagnum
- P/f Vága Floghavn

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar ella útreiðslur við sær fyri landið ella kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið lættir um umsitingarliga hjá TAKS og fer at minka um umsitingina, sum er av tolleftirlitinum.

Lógaruppskotið áleggur havnamyndugleikum at boða tollvaldinum frá ófráboðaðum skipum, sum koma til tolløkið, og at boða frá, tá og um teir vera varugir við, at skip uppskipa ella innskipa vørur ólógliga. Lógaruppskotið hevur ikki aðrar umsitingarligar avleiðingar við sær fyri kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið ger greitt, at tollvaldið skal hava atgongd til ferðafólkaupplýsingar frá flutningsfeløgum talgilt og uttan kostnað. Talan er um eina skyldu, sum Fíggjarmálaráðið og TAKS meta, longu er í galdandi tolllóg, men hetta lógaruppskotið ger greitt, at tollvaldið kann krevja at fáa upplýsingarnar talgilt, eitt nú við beinleiðis atgongd til skipanirnar hjá flutningsførum og/ella flutningsfeløgum uttan kostnað fyri tollvaldið.

Lógaruppskotið áleggur útlendskum skipum, sum koma inn á føroyska tolløkið, at tey skulu hava føroyskan agent. Hetta kravið er ikki í galdandi tolllóg.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki við sær serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, sum lógaruppskotið fevnir um, og uppskotið hevur ikki avleiðingar við sær í mun til tilíkar sáttmálar.

## 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Fíggjarmálaráðið metir ikki, at tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

Nevnast kunnu hesi tríggir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar:

1) **Hoyvíkssáttmálin**

Sáttmálin varð settur í gildi í Føroyum við *Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin*. Sáttmálin hevur virkað frá 31. august 2005.

Løgtingið viðgjørdi sáttmálan í løgtingsmáli nr. 15/2005, og tann 2. mai 2006 varð løgtingslógin endaliga samtykt av Løgtinginum.

Sáttmálin skipar Føroyar og Ísland sum eitt búskaparøki, har tað innan fyri innihaldsvídd sáttmálans er bannað at gera mismun vegna tjóðskap, virkisstað ella vegna vøruuppruna.

Fíggjarmálaráðið metir, at lógaruppskotið samsvarar við Hoyvíkssáttmálan og at lógaruppskotið ikki ger seg inn á nakrar skyldur ella bindingar, sum Hoyvíkssáttmálin áleggur Føroyum.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**

Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar sum lóg tann 1. mai 2000 við *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention*.

Løgtingið viðgjørdi sáttmálan í løgtingsmáli nr. 12/1994: Uppskot til samtyktar um Ígildissetan fyri Føroyar av lóg um Tann Evropæiska Mannarættindasáttmálan. Uppskot varð samtykt við 29–0 atkvøðum. Við løgtingsmáli nr. 92/1995: Uppskot til ríkislógar-tilmæli um Broyting í lóg um tann europeiskan mannarættindasáttmálan varð samtykt, at protokollirnar 9–11 eisini skuldu setast í gildi fyri Føroyar. Evropeiski Mannarættinda-sáttmálin sum samtyktur við løgtingsmál nr. 12/1994 og broytingarnar sum samtyktar við løgtingsmáli nr. 92/1995 komu tó ikki í gildi fyri Føroyar fyrr enn tann 1. mai 2000.

Evropeiski Mannarættindasáttmálin hevur til endamáls at verja borgarar í teimum evro-peisku londunum ímóti mannarættindabrotum. Sáttmálin varð samtyktur í Evroparáðnum í 1950 við íblástri frá heimsyvirlýsingini hjá ST.

Ein røð av ískoytisprotokollum er løgd aftur at sáttmálanum gjøgnum árini. Í Føroyum er í gildi høvuðssáttmálin frá 4. november 1950 sum broyttur við protokoll nr. 3, 5, 8, 10 og 11 og ískoytisprotokollirnar nr. 1, 4, 6 og 7.

Fíggjarmálaráðið metir, at lógaruppskotið samsvarar við evropeiska mannarættindasáttmálan og at lógaruppskotið ikki ger seg inn á nøkur mannarættindi, sum eru staðfest í sáttmálanum ella í protokollum, sum stava frá sáttmálanum.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Sáttmálin er ikki settur í gildi í Føroyum sum lóg, men sum altjóða sáttmáli.

Løgtingið viðgjørdi sáttmálan í løgtingsmáli nr. 162/2008 og nr. 163/2008, og tann 13. mai 2009 varð sáttmálin góðkendur av Løgtinginum.

Sáttmálin fekk gildi fyri Danmark og harvið eisini fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

Sáttmálin er kunngjørdur við *Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

Fíggjarmálaráðið metir, at lógaruppskotið samsvarar við Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, og metir ikki, at lógaruppskotið ger seg inn á nøkur rættindi, sum eru staðfest í sáttmálanum.

**2.9. Markaforðingar**
Kendar markaforðingar eru ikki á økinum, sum lógaruppskotið fevnir um. Lógaruppskotið verður ikki mett at hava við sær markaforðingar, sum ikki eru til staðar í sambandi við galdandi tolllóg.

At lond, harundir Føroyar, áleggja fólki og fyritøkum at rinda toll, tá ið ávísar vørur koma inn á tolløkið og fara um landamørk er sjálvsagt í sjálvum sær ein markaforðing, sum má væntast at ávirka flytførið í ein ávísan mun hjá borgarum og vinnulívi. Hetta lógaruppskotið verður kortini ikki mett at hava við sær nýggjar markaforðingar, sum ikki eru í sambandi við galdandi tolllóg.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger lógaruppskotið onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki, eigur at verða grundgivið fyri, hví hildið verður, at inntrivið er neyðugt. Meting skal verða gjørd, um inntrivið stendur mát við lógarbrotið og við endamálið í lógini.

Verður revsiheimild ásett í løgtingslóg, ið heimilar revsiásetingar í kunngerð, skal sjálv revsiramman standa í løgtingslógini. Somuleiðis skal standa í løgtingslógini, at brot á ásetingar givnar við heimild í hesi løgtingslóg kunnu revsast.
(Sí nr. 1.2.2.10. í rundskrivinum um lógarsmíð).

**2.11. Skattir og avgjøld**
Í lógaruppskotinum eru ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Sambært § 23 í tolllógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um avgreiðslutíðina hjá Toll- og Skattstovu Føroya og um tænastugjøld fyri tollavgreiðslur, sum fara fram aftaná

avgreiðslutíð. Landsstýrismaðurin kann eisini áseta nærri reglur um tænastugjøld í sambandi við tolling og umtolling.

Í lógaruppskotinum verður skotið upp, at heimildin í §23 í tolllógini eisini fevnir um tænastugjøld í sambandi við tolleftirlit og at heimild verður at áseta gjøld í sambandi við elektroniskar fráboðanir og avgreiðslur.

TAKS er fyri tað mesta fíggja við játtan á løgtingsins fíggjarlóg. Harafturat er lítil partur av virkseminum hjá TAKS fíggjaður við, at brúkarar og fyritøkur rinda tænastugjøld fyri ávísar tænastur, sum TAKS veitir.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur havna- og flogferðslumyndugleikum eina skyldu at boða tollvaldinum frá, tá ið ófráboðað skip og flogfør koma til tolløkið, og tá ið havnamyndugleikar vera varugir við, at skip uppskipa ella innskipa vørur ólógliga. Endamálið er at lætta um uppgávuna hjá TAKS at hava tolleftirlit.

Lógaruppskotið áleggur harafturat útlendskum skipum at hava føroyskan agent. TAKS og Fíggjarmálaráðið meta, at tørvur er á einum kravi um, at útlendsk skip, sum koma inn á føroyska tolløkið, hava føroyskan agent.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at áseta nærri reglur um tænastugjøld í sambandi við eftirlitsarbeiði og at áseta gjøld í sambandi við elektroniskar tænastuveitingar, sum TAKS veitir.

Sambært § 23 í tolllógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um avgreiðslutíðina hjá Toll- og Skattstovu Føroya og um tænastugjøld fyri tollavgreiðslur, sum fara fram aftaná avgreiðslutíð. Landsstýrismaðurin kann eisini áseta nærri reglur um tænastugjøld í sambandi við tolling og umtolling.

Fíggjarmálaráðið skjýtur upp, at heimildin eisini fevnir um tænastugjøld í sambandi við tolleftirlit og at heimild verður at áseta gjøld í sambandi við elektroniskar fráboðanir og avgreiðslur.

Lógaruppskotið gevur eisini TAKS heimild at áseta, havt neyðug útgerð er í hølum til at hava tolleftirlit við ferðafólki. Fíggjarmálaráðið mælir til, at tað verður gjørt greitt í § 28, stk. 6 í tolllógini, at tollvaldið ásetir, hvat neyðug útgerð er til hølir at gera ferðafólkaeftirlit í, at tollvaldið kann hava vakmyndatól á flogvøllum og farstøðum til tolleftirlit og at tollvaldið kann goyma vakmyndaupptøkur í 30 dagar ella eftir tørvi.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið staðfestur, at flutningsfeløg hava skyldu til at skipa fyri hølum við neyðugari útgerð v.m. til tollvaldið (TAKS) at nýta til tolleftirlit av ferðafólki. Tollvaldið (TAKS) hevur atgongd til hesa privatu ogn hjá flutningsfeløgunum at hava tolleftirlit í, og hetta er staðfest í

galdandi tolllóg. Hetta lógaruppskotið ger eisini greitt, at tollvaldið (TAKS) ásetir, hvat er neyðug útgerð í einum tílíkum høli til tolleftirlit við ferðafólki.

Lógaruppskotið gevur eisini tollvaldinum loyvi til at hava vakmyndatól á flogvøllum og farstøðum (ella har ferðafólk koma í land) og gevur tollvaldinum rætt til at goyma upptøkur úr vakmyndatólum í 30 dagar ella eftir tørvi.

## 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina

**Til § 1**

**Nr. 1**

Broytingin í nr. 1 strikar § 5 í tolllógini. Sambært § 5 í galdandi tolllóg er toll- og vøruskráin til skjals og kann keypast frá Toll- og skattstovu Føroya, og landsstýrið ásetur gjaldið fyri toll- og vøruskránna.

Fíggjarmálaráðið mælir til at strika § 5 í galdandi lóg. Í dag er toll- og vøruskráin sjálvsagt ikki bara til skjals, men liggur eisini alment atkomulig og ókeypis á heimasíðuni hjá TAKS. § 5 í galdandi tolllóg tekur ikki hædd fyri møguleikunum, sum eru komnir við internetinum og heimasíðum. Fíggjarmálaráðið skjýtur tí upp at strika § 5.

**Nr. 2**

Broytingin í nr. 2 hevur við sær, at tannprotesur verða undantiknar tolli og javnsettar aðrar protesur. Sambært § 6, litra g í galdandi tolllóg eru tannprotesur ikki undantiknar tolli. Allar aðrar protesur eru kortini undantiknar tolli.

Fíggjarmálaráðið skjýtur upp, at tannprotesur verða undantiknar tolli, eins og aðrar protesur.

**Nr. 3**

Broytingin í nr. 3 nágreinar heimildina í § 23 um tænastugjøld. Sambært § 23 í tolllógini kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um avgreiðslutíðina hjá Toll- og Skattstovu Føroya og um tænastugjøld fyri tollavgreiðslur, sum fara fram aftaná avgreiðslutíð. Landsstýrismaðurin kann eisini áseta nærri reglur um tænastugjøld í sambandi við tolling og umtolling.

Fíggjarmálaráðið skjýtur upp, at heimildin eisini fevnir um tænastugjøld í sambandi við tolleftirlit og at heimild verður at áseta gjøld í sambandi við elektroniskar fráboðanir og avgreiðslur.

**Nr. 4**

Broytingin í nr. 4 ger greitt, at avvarðandi myndugleikar og stovnar hava ábyrgd av at málsvigera mál liðugt viðvíkjandi lutum, sum eru steðgaðir í tolleftirlitinum. Sambært § 27 a hevur Tollvaldið eftirlit við, at tað ikki í sambandi við innflutning av vørum til føroyska tolløkið, útflutning ella transit av føroyska tolløkinum verða framd brot á forboð móti innflutningi, útflutningi ella transit, sum eru ásett av trygdar-, heilsu-, djóralæknafrøðiligum-, plantupatologiskum-, gjaldoyra- ella øðrum orsøkum.

Í galdandi tolllóg er ikki greitt, hvør stovnur ella myndugleiki hevur ábyrgdina av at málsviðgera tey mál og lutir liðugt, sum eru steðgaðir í tolleftirlitinum. Innflutningurin er nógv vaksin síðstu árini, og hetta hevur við sær nógva umsiting av tílíkum málum fyri TAKS.

Heilivágur er eitt dømi um tílíka vøru, sum viðhvørt verður steðgað í tolleftirlitinum. Mannagongdin hjá TAKS er, at eftir at vøran er steðgað í eftirlitinum og landsapotekarin hevur kannað vøruna og staðfest, at talan er um heilivág, hevur TAKS málsviðgerðararbeiðið av vøruni. Í Danmark er málsviðgerðararbeiðið av tílíkum málum hjá apotekinum/heilsu-myndugleikunum.

Eitt annað dømi um tílíkar vørur er, tá ið tollvaldið steðgar ymiskum djórum. Hetta kann koma fyri, tá ið ferðafólk hava djór við sær.

Fíggjarmálaráðið skjýtur upp, at gjørt verður greitt í tolllógini, at TAKS boðar rætta og avvarðandi myndugleika/stovni frá, tá ið djór, plantur, heilivágur, gjaldoyra v.m. eru steðgað í eftirlitinum í sambandi við innflutning og at avvarðandi myndugleiki/stovnur hevur ábyrgdina av at málsviðgera tílík mál liðugt.

**Nr. 5**

Broyting nr. 5 ger greitt, at TAKS skal hava atgongd til ferðafólkaupplýsingar talgilt og uttan kostnað. Flutningsfeløgini í Føroyum, t.e. Atlantic Airways og Smyril Line, hava eftir áheitan givið TAKS allar upplýsingar um ferðafólk.

Føroysku flutningsfeløgini, t.e. Atlantic Airways og Smyril Line, hava eftir áheitan givið TAKS allar upplýsingar um ferðafólk. Hetta hevur verið gjørt á tann hátt, at TAKS hevur fingið atgongd til ferðafólkaskipanirnar hjá feløgunum. TAKS hevur heitt á SAS um at geva tolleftirlitinum somu atgongd til teirra ferðafólkaskipanir.

Hóast TAKS og Fíggjarmálaráðið meta, at neyðug heimild er í tolllógini og í kunngerð nr. 38 frá 2012 um tolleftirlit, skjýtur Fíggjarmálaráðið upp at nágreina heimildirnar soleiðis, at ivi ikki er um, at tollvaldið skal hava atgongd til ferðafólkaupplýsingar talgilt og uttan kostnað.

Tílíkar skyldur eru ikki óvanligar. Eitt dømi er skyldan í § 10 í kolvetnisskattafyrisitingarlógini, ið áleggur flutningsfeløgum o.ø. at lata skattavaldinum nøvn á ferðafólkum, sum tey flyta til og frá virksemi, ið er fevnt av kolvetnisskattalógini. Landsstýrismaðurin kann harafturat við kunngerð áseta nærri reglur um, hvussu og nær hesir upplýsingar skulu latast.

**Nr. 6**

Ásetingin ger greitt, at neyðug útgerð skal vera í hølum til tolleftirlit við ferðafólki og at TAKS ásetir, hvat neyðug útgerð í tílíkum hølum er. Fíggjarmálaráðið mælir til, at tað verður gjørt greitt í § 28, stk. 6 í tolllógini, at tollvaldið ásetir, hvat neyðug útgerð er til hølir at gera ferðafólkaeftirlit í. Harafturat skjýtur Fíggjarmálaráðið upp, at ásett verður, at tollvaldið kann hava vakmyndatól á flogvøllum og farstøðum til tolleftirlit og at tollvaldið kann goyma vakmyndaupptøkur í 30 dagar ella eftir tørvi.

Neyðug útgerð til høli at hava tolleftirlit við ferðafólki broytist við tíðini. Neyðug útgerð í dag er ikki sama útgerð, sum varð mett at vera neyðug fyri 30 árum síðani. Neyðug útgerð er í dag til dømis upptøku- og vakmyndatól, neyðknøttur, innrætting av eftirlitsrúmum, serlig túrrvesi, røntgentól o.s.fr. Endamálið við útgerðini er at økja um trygdina hjá ferðafólki og starvsfólki.

**Nr. 7**

Fyri at lætta um uppgávuna hjá TAKS at hava tolleftirlit skjýtur Fíggjarmálaráðið upp, at tað verður álagt havnamyndugleikum og flogferðslumyndugleikum at boða tollvaldinum frá, tá ið ófráboðað skip og flogfør koma til tolløkið, og tá ið havnamyndugleikar vera varugir við, at skip uppskipa ella innskipa vørur ólógliga.

**Nr. 8**

Sambært hesum fáa útlendsk skip skyldu at hava føroyskan agent. TAKS og Fíggjarmálaráðið meta, at tørvur er á einum kravi um, at útlendsk skip, sum koma inn á føroyska tolløkið, hava føroyskan agent. Í løtuni hevur bara Tórshavnar kommuna krav um, at útlendsk skip hava føroyskan agent.

**Nr. 9**

Í § 30, stk. 3 í tolllógini er ein orðing um, at tollyvirmaðurin skal geva boð um útvíðkaða kanning av fólki. Orðingin stavar frá fyrr av, tá ið tollyvirmenn starvaðust hjá tollvaldinum. TAKS er í dag skipað við einum tollleiðara og so tollarum. Teir tollarar, sum eru á vakt, taka støðu í samráði við hvønn annan. Í dag er ikki talan um, at ein tollari er omanfyri annan tollara, og TAKS hevur ikki tollyvirmenn í starvi í dag.

**Nr. 10**

Revsireglurnar í § 36, stk. 1, nr. 2 nevna ikki nýggja stk. 8 í § 28, sum skotið verður upp at skjóta uppí tolllógina. Fíggjarmálaráðið skjýtur upp at gera fylgibroyting í revsireglunum í § 36, stk. 1, nr. 2, soleiðis at nýggja stk. 8 í § 28 eisini verður nevnt.

**Nr. 11**

Revsireglurnar í § 36, stk. 1, nr. 3 nevna ikki nýggja stk. 9 í § 28, sum skotið verður upp at skjóta uppí tolllógina. Fíggjarmálaráðið skjýtur upp at gera fylgibroyting í revsireglunum í § 36, stk. 1, nr. 3, og at nýggja stk. 9 í § 28 eisini verður nevnt.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 15. januar 2019.

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: